# Jólasøla við 60 básum

**Á hvørjum ár skipar Føroya Heimavirkisfelag fyri jólasølu. Í ár setur henda frams‡ningin øll met, nú ikki færri enn 60 fólk verða við.**

SØLUFRAMS‡NING
*Snorri Brend*

**Havn:** Tey, ið ikki enn hava keypt allar jólagávurnar fáa eitt serstakt høvi til hetta um vikuskiftið í ítróttarhøllini í Havn.

Og hava fólk ein serstakan áhuga í at keypa heimagjørdar føroyskar jólagávur, so er helst henda jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag rætta høvið til tað.

Eins og undanfarin ár bjóðar felagið nevniliga limum sínum úr øllum landinum at vísa fram tað, tey hava latið úr hondum til hesa frams‡ningina.

Undanfarin ár hevur talið av frams‡narum verið í vøkstri, og tað er tað eisini í ár. Ikki færri enn 60 luttakarar úr øllum landinum verða við nú um vikuskiftið.

- Her eru fólk bæði úr Suðuroy og Klaksvík. Og hetta er tað mesta nakrantíð, verður uppl‡st.

Jólasølan letur upp leygardagin kl. 10 og er opin sunnudagin eisini.

60 básar

Tey hava fyrireikað alt so væl í seinastuni, og í morgin er klárt.

Íalt verða 60 básar settir upp í ítróttarhøllini á Hálsi, so har verður ríkiligt pláss hjá teimum virknu limunum í Heimavirkisfelagnum.

Og har verður samstundis eisini gott pláss til tey mongu vitjandi, sum vanliga leggja leiðir sínar til hesa serstøku jólasøluna.

At byrja við var henda jólasølan í Gundadalshøllini, men í fjør varð avgjørt at flyta niðan í størru høllina, tí hin var vorðin ov trong – ella, um ein vil, tí bæði talið á frams‡narum og á vitjandi var vorðið so ógvuliga stórt.

Á frams‡ningini fer nærum alt at kunna fáast til keyps, bæði av bundnum, seymaðum, trælutum og so framvegis.

Ein lítil kaffistova er eisini á frams‡ningini, har fólk hava møguleika at keypa sær smyrjibreyð við føroyskum viðskera á.


*Jólasølan í ítróttarhøllini á Hálsi setur øll met í ár, tá talan er um luttakarar*

## Nú verður Knørra-seðilin drigin

Stóri lutaseðilin hjá Róðrarfelagnum Knørri verður nú drigin.

Sølan hevur gingið væl, og nógv munnu tey vera, sum vóna at vinna gávukortið á 300.000 krónur, ella kanska ein av teimum 25 eykavinningunum.

Róðrarfelagið Knørrur leggur dent á, at drátturin verður ikki útsettur.

Seðilin fæst til keyps fram til klokkan 18 leygardagin, tá ið sølan endar. So tey, sum vilja eiga ein Knørraseðil, skulu kvika sær.

Vinnandi numrini verða lýst antin týsdagin ella mikudagin í næstu viku.

**sb.**

## Skótafløga við teimum kendu sangunum

**Teir seinastu mánaðirnar hava KFUM-skótarnir í Føroyum arbeitt við einari fløgu við skótasangum. Henda fløgan er nú loksins liðug og kemur í sølubúðirnar fyrst í desembur mánaði**

FLØGUR
*Snorri Brend*

**Skótar:** Nýggja fløgan eitur "Skótar vit eru" og inniheldur 12 sangir.

Hesir sangirnir eru allir vælkendir skótasangir, m.a. Jákup vaknar í tjaldinum, Ging gang gooli, Tess meir vit eru í felag, Brekkulegusangurin, Úlvasangurin, Nú flúgva myrkurs fuglar út og aðrir.

Sangirnir eru sungnir av ungum skótum frá ymiskum skótabólkum kring oyggjarnar, og setur hetta ein heilt serligan dám á fløguna.

Birgir I. Sigurðsson, ið m.a. er kendur frá tónleikabólkinum I AM, luttekur somuleiðis á fleiri sangum.

Tónleikurin er lagdur til rættis av tí navnframa Hans Poulsen, ið eftirhondini er vorðin eitt kent navn í Føroyum.

Fløgan er ætlað sum ein barna- og ungdómsfløga, og kanska serliga teimum ið eru skótar, hava verið skótar og teimum ið hava áhuga í skótarørsluni.

Sum sagt eru 12 sangir á fløguni, men hesir sangirnir eru í tveimum útgávum: Ein útgáva við røddum og ein uttan. Tvs. at lurtarin hevur møguleika at læra seg sangirnar og sjálvur syngja røddirnar. Hetta er kent sum kareoke uttanlands og er tað sera umtókt.

Tey fyrstu 300 ið keypa fløguna í sølubúðunum fáa umframt fløguna, eisini eina plakat og klisturmerkir við í keypinum.

NORÐOYAREDAKTIÓNIN



í Nólsoyar Pálsgøtu 1, fer í framtíðini at hava opið soleiðis:

**Mánadag kl. 09-12**
Vakthavandi: Vilmund Jacobsen

**Mikudag kl. 09-12**
Vakthavandi: Snorri Brend

**Hósdag kl. 09-12**
Vakthavandi: Anna Ellingsgaard

So um tit hava tíðindi, heilsanir, lýsingar til lýsingartorgið, tilfar til Nøvn í vikuni og annað viðkomandi sum norðoyingar ynskja at fáa við í blaðið, so støkk inn á gólvið hjá okkum.
*Eisini ber til at gjalda fyri lýsingar og heilsanir á redaktiónini*

Sosialurin

NÓLSOYAR PÁLSGØTA 1 · TEL 458686 · FAX 458687 · T-POST: KLAKSVIK@SOSIALURIN.FO

Sosialurin 341800